

Teir eiga hvør sína helvt í byggivirkinum KBH á Toftum, brøðurnir, Helgi og Benn Johannesen. Helgi er stjóri og tekur sær mest av fyrisitingarligum uppgávum, meðan Benn meiri er byggileiðarin

Mynd: Vilmund Jacobsen

# KBH stovnað í 1999

**Hóast byggivirkið KBH er stovnað í endanum av nítiárunum, hevur felagið kortini røtur heilt aftur til tíðliga í sekstiárunum, tá pápi Helga og Benn – Karl – fór undir egið virkið**

Vilmund Jacobsen

Sp/f KBH er stovnað í august 1999. Í byrjanini vóru tríggir partaeigarar, Karl og tveir av synum hansara, Helgi og Benn.

Seinni yvirtóku Helgi og Benn virkið, meðan faðirin framvegis arbeiddi sum handverkari í fyritøkuni.

Eigararnir og tey, sum starvast hjá felagnum, hava drúgvar royndir innan byggivirksemið á mongum økjum.

Karl hevur soleiðis havt egið virki síðani tíðliga í sekstiárunum, tá hann gjørdist partur av KBH í 1999.

Um núverandi eigarar er annars at siga, at Benn varð útlærdur sum húsasmiður í 1982 og hevur arbeitt sum timburmaður og arbeiðsformaður síðani. Hann hevur verið við til bæði stór og smærri verkætlanir – í Føroyum og uttanlands. Hann hevur arbeitt innan næstan øll økir í byggivinnuni.

Helgi varð úlærdur sum húsasmiður í 1990 og tók prógv sum byggifrøðingur í 1993. Umframt at hava arbeitt sum timburmaður, hevur Helgi eisini starvast sum byggifrøðingur í Danmark í fýra ár.

KBH hevur síðani byrjan verið í støðugum vøkstri.

## Nøktar tín tørv

KBH sær tað sum sína fremstu uppgávu at geva viðskiftafólki eina skilagóða og hóskandi ráðgeving til júst ta uppgávuna, sum fólk hava tørv á at fáa loysta.

Byggivirkið er ført fyri at loysa og samskipa flestu uppgávur innan bygging, og felagið hevur eisini fólk við førleikum til sera fjølbroyttar uppgávur. Haraftrat samstarvar KBH dagliga við fyritøkur á øllum økjum innan bygging.

*vilmund@sosialurin.fo*



BYGNINGAR

*KBH hevur framt nógvar stórar verkætlanir, eitt nú Heilsumiðstøðina í Runavík, íbúðarbygging í Runavík og eldrasambýli á Toftum – bert fyri at nevna nakrar úr rúgvuni*

# Meiri fleksibilitetur við eini arbeiðshøll

**- Tað er lættari at leggja til rættis, tá tú hevur eina byggihøll við góðum amboðum, sigur Helgi Johannesen**

Byggivirkið KBH hevur bygt sær eina rúmliga og snotuliga arbeiðshøll innanfyri Oyrarnar á Toftum. Grundplanurin í høllini er 600 fermetrar, og í ovaru hæddini eru tvær ferðir 100 fermetrar við eitt nú skrivstovum, kaffistovu og wc'um.

Umsitingin hjá fyritøkuni er soleiðis í ovaru hæddini, og Helgi Johannesen, stjóri, sigur, at her er so mikið gott pláss, at umstøður eisini eru til at leiga onkrar skrivstovur út, um áhugi er fyri tí.

## Meiri fleksibul

Stjórin vísir á, at byggihøllin ger virksemið hjá byggivirkinum meiri fleksibult.

– Her kunnu vit smíða elementir til ymiska bygging innandura, og vit hava góð amboð at arbeiða við. Eisini kunnu vit hava ymiskt á goymslu, eitt nú vindeygu og hurðar, sum skulu brúkast til ymisku arbeiðini. Vit liggja tó ikki inni við timbri, tí tað hevði fylt ov nógv upp, um so var, leggur hann aftrat.

Helgi Johannesen sigur, at tað er lættari at leggja arbeiðini hjá byggivirkinum til rættist, nú umstøðurnar innandura eru so góðar.

**Her kunnu vit smíða elementir innandura, og vit hava góð amboð at arbeiða við**

HELGI JOHANNESEN

Stjórin endurtekur, at KBH soleiðis ger bæði stórt og smátt – alt frá betongarbeiði, til timbur- og snikkaraarbeiði.

*vilmund@sosialurin.fo*